## Hyundai í Evropa



Hyundai Automotive Group í Suðurkorea hava váttað tíðindini um at evropeisku londini, Polen og Slovaka, kappast um at hýsa eini Hyundai bilverksmiðju. Arbeiðið skal eftir ætlan byrja í 2005 og verða liðugt í 2007

*Kelda: Hyundai Bil Import A/S*

## Hyundai í Kina



Vegna stóra øking í søluni av Hyundai bilum framskundar Beijing Hyundai Automotive Co., sum framleiða bilarnar í Kina, ætlanirnar um at tvífalda framleiðsluna av Hyundai bilum til 600.000 eindir árliga í 2007

*Kelda: Hyundai Bil A/S*

## Saab 9-2X



General Motors, sum eiga Saab bilverksmiðjuna, hava avgjørt at Saab skal samstarva við Subaru um framleiðslu av einum minni Saab. Talan verður um ein Saab 9-2X, sum verður bygdur yvir Subaru Impreza og kemur á marknaðin í USA, Kanada og Japan á sumri 2004

*Kelda: Bil Magasinet*

Reyni Service:

# Faldara til hvørt húski í landinum




*Reyni Service sendir hendan faldaran til hvørt húski í landinum*

**Reyni Service í Hoyvík sendir í hesum døgum út ein faldara til hvørt húski í landinum. Faldarin er ein lýsing av fyritøkuni og tí hon stendur fyri**

FYRITØKA

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Reyni Servce bjóðar seg nú fram við at senda ein faldara til hvørt húski í landinum. Faldarin er gjørdur fyri at lýsa fyritøkuna, og hvat hon hevur at bjóða. Har verður í teksti og myndum sagt frá um allar deildirnar hjá fyritøkuni, sum t.d. bilasøluna, biltøkniliga verkstaðin sum bæði er D.A.F.- og TSM góðkendur, og um plátuverkstaðin og eykalutagoymsluna, Tidy Car o.s.fr.

Faldarin er snotuligur og væl úr hondum greiddur, og lýsir hvat Reyni Service stendur fyri. Fremst í faldaranum stendur t.d. "Góð tænasta hevur nógv at siga fyri okkum, og øll á Reyni Service hava sett sær sum mál, at vit verða kend fyri at geva viðskiftafólki okkara eina dygdargóða tænastu á høgum stigi".

Í faldarum eru eisini lýsingar frá fleiri ymiskum fyritøkum.

Faldarin verður í fyrstu atløgu sendur til øll húski uttan fyri Havnina. Um tvær vikur ella so fáa fólk í Tórshavnar kommunu faldaran.

Fiat Panda:

# Ársins bilur í Evropa 2004

**Fiat Panda er av evropeiskum motorjournalistum í kosin "Car of the Year 2004". Panda er ein nútímans og framkomin bilur í allar mátar við nógvum elektroniskum trygdarskipanum og t.d seks airbag**



*Fiat Panda er kosin "Car of the Year 2004" í Evropa*

BILAR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Við 281 atkvøðum kom Nýggi Fiat Panda á eitt fyrsta pláss í kappingini um at blíva ársins bilur í Evropa 2004. 55 út av 58 motorjournalistum atkvøddu fyri Fiat Panda, harav 16 valdu hann á eitt 1. pláss.



Bilarnir verða dømdir eftir designi, komfort, trygd, bensin- ella oljunýtslu, hvussu praktiskir og umhvørvisvinarligir teir eru, og um teir eru pengarnar verdir.

Í mun til støddina er nýggi Fiat panda ein smartur og praktiskur familjubilur, sum samstundis er væl egnaður til býkoyring. Bilurin er væl innrættaður og plássið væl útnýttað, bæði hvat persónum og viðføri viðvíkur. Panda er ein nútímans og framkomin bilur í allar mátar. Hann hevur nógvar elektroniskar trygdarskipanir og t.d airbag framman, í síðunum og gardinarbag.

Tað eru umleið tveir mánaðir síðan nýggi Panda kom á marknaðin, síðan tá hava 95.000 kundar bílagt sær ein Panda. Í Danmark eru seldir 400 bilar síðan 21. september.



# BILATORGIÐ

Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag



**MERCEDES 300 SD TURBO DIESEL**
Árg 1981, Km 350.000. Stórur og rúmligur bilur. Kr. 35.000.



**MERCEDES BENZ 190E 2,6 6 SYL.**
Árg 1989, Km ca.260.000. Bilurin er myrkabláur. Í góðum standi. Kr. 18.000.



**HONDA VT 500 E**
Árg 1983, Km 28.000. Lítið brúkt og í góðum standi. Kr. 15.000.



**YAMAHA FJ 1100**
Árg 1985, Km 85.500. Serútgjørd og sera væl hildin. Kr. 22.000.



**MERCEDES BENZ 300 SE**
Árg 1962, Einans 150 bilar vórðu gjørdir í 1962. Bilurin, sum má restaurerast, er so sjaldsamur at hann heilt avgjørt heldur sítt virði.



**MERCEDES BENZ**
Árg 1976Km 273.000. Bilurin, er í góðum standi, sær út sum nýggjum. Kr. 32.000.



**YAMAHA VIRAGO XV 750**
Árg 1996, Km 52.000. Sera væl hildin. Kr. 30.000.



**KAWASAKI VN 1500**
Árg 1990, Km 57.000. Í góðum standi. Kr. 22.000.

*Folmers Auto - Folmers MC*
Odensevej 2 • DK-5500 Langeskov
Tel. 0045 65382497 / 0045 65383848
e-mail: kontakt@folmers-auto.dk/post@folmersmc.dk

**Vit hava hópin av góðum tilboðum.**
Hyggið inn á heimasíður okkara:
www.folmers-auto.dk / www.folmersmc.dk

# Bilasølan minni í ár

**Nú bert ein mánaður er eftir av árinum, vísa hagtølini fyri skráseting av nýggjum akførum hjá Bileftirlitinum, at umleið 245 færri akfør eru seld higartil í ár**

TÍÐINDASKRIV

Hagtøl fyri skráseting av nýggjum akførum frá januar til og við november 2003 vísa at 245 færri akfør eru seld hesar ellivu mánaðirnar. Sølan av hýruvognum er ikki nógv broytt, meðan 200 færri persónbilar eru seldir, ein minking uppá 13,5 prosent. Sølan av vøruvognum er minkað við 63 prosentum, frá 309 í 2002 til 246 í 2003. Talið av nýggjum motorsúkklum er vaksið við 86 prosentum.



JEEP GRAND CHEROKEE



· myrkabláur
· árg. 96
· automatisk gear
· km. 72.000

Motorur : Bensin · 5.200 $cm^3$ · V8 · 215 hk
øll sýn og eftirlit hjá Chrysler.

Leðursetur aftan og framman, klimakontrol, el-setur framman v/programmering, el rútar aftan og framman, el. spegl, el. sóltak úr glasi, hiti í setrum framman, 17'' sportfelgur við breiðum profildekkum umframt org. felgur við heilársdekkum.

Til sølu fyri hóskandi boð omanfyri kr. 150.000,-

Jógvan Nielsen
225498/314849

Sosialurin 341800

## Hagtøl fyri skráseting av nýggjum akførum fyri JAN-NOV í 2003 og 2002

| Akfaraslag | Nov 2003 | Nov 2002 | Broyting Nov 02/03 | Jan-Nov 2003 | Jan-Nov 2002 | broyting 2002-2003 | %broyting 2002-2003 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Brandbilar | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 0 | 0,00% |
| Bussar | 0 | 0 | 0 | 4 | 17 | -13 | -76,47% |
| Kampingvogn | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | |
| Hýrubilar | 1 | 0 | 1 | 19 | 23 | -4 | -17,39% |
| Lastbilar | 1 | 1 | 0 | 22 | 17 | 5 | 29,41% |
| Leguvognar | 0 | 0 | 0 | 6 | 3 | 3 | 100,00% |
| Motorsúkkla | 1 | 2 | -1 | 13 | 7 | 6 | 85,71% |
| Neyðsendakfar | 2 | 0 | 2 | 4 | 4 | 0 | 0,00% |
| Persónbilar | 98 | 95 | 3 | 1271 | 1469 | -198 | -13,48% |
| Smábussar | 0 | 1 | -1 | 6 | 2 | 4 | 200,00% |
| Tangabilar | 0 | 0 | 0 | 4 | 1 | 3 | 300,00% |
| Viðfestivognar | 80 | 7 | 1 | 125 | 114 | 11 | 9,65% |
| Vøruvognar | 20 | 31 | -11 | 246 | 309 | -63 | -20,39% |
| Samlað | 131 | 137 | -6 | 1722 | 1967 | -245 | -12,46% |

*Hagtøl fyri skráseting av nýggjum akførum fyri januar-november í 2003 og 2002*